## Olofson aftur til Tanzania



Miðskeiðis í august mánaði fara hjúnini Anne-Lene og Peter O. K. Olofsen (myndin) aftur til afrikanska landið Tanzania. Eftir at hava verið á málskúla í sjey vikur í høvuðsstaðnum Dar es Salaam fara tey víðari til Sumbawanga, har vesturi í landinum. Her fer Peter at undirvísa á bíbliuskúlanum hjá Brøðrakirkjuni, meðan Anne-Lena verður hjálparfólk hjá barna- og kvinnuráðgevanum hjá kirkjuni. Útsendingin av Olofson-hjúnunum verður fyriskipað av Kirkjuliga Missiónsfelagnum og verður í Klaksvík tann 10. august.

## Túsund børn á summarlegur í Nesvík

Fyrstu summarlegurnar hjá Heimamissiónini eru nú byrjaðar. Í alt verða 10 legur og væntandi fara væl yvir túsund børn, juniorar, ung og vaksin á legu í summar, skrivar Trúboðin. Væl av tekningum eru eisini komið til familjuleguna, ið verður beint eftir ólavsøku. Sum nakað nýtt á legunum í ár, kunnu bæði børn og vaksin stuttleika sær á nýggjari hoppipútu, sum nú er komin í Nesvík. Høvi verður eisini at spæla nøkur nýggj spøl, tí nú er bæði flogbóltsnet, kurvabólt, tennisútgerð og annað komið til leguhúsið.

# Einki formelt kjak um samanlegging



*Linjohn Christiansen, borgarstjóri í Skálavík, Gerhard Lognberg, borgarstjóri í Skopun, Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri á Sands kommunu og Hanus undir Leitinum, borgarstjóri í Húsavíkar kommunu*

*Mynd: Snorri Brend*

**Borgarstjórarnir í Sandoynni eru ikki samdir um kommunu-samanlegging. Enn hevur tó einki formelt kjak verið um samanlegging – men onkrir vísa á samanlegging við Tórshavnar kommunu**

KOMMUNUSAMANLEGGING
*Sólvit Nolsø*
*post@sosialurin.fo*

Rákið seinastu árini í Føroyum hevur verið vent mótvegis samanlegging millum kommunur. Gøta og Leirvík hava lagt saman; Tórshavnar kommuna strekkir seg frá Hesti til Kollafjørð; Runavíkar kommuna hevur fingið fleiri bygdir afturat sær, og Bøur og Gásadalur eru farin í Sørvágs kommunu. Aðra staðni hevur eisini verið kjak um kommunusamanlegging, uttan at nakað beinleiðis úrslit er komið burturúr. Tó eru tað fleiri, sum hava saknað eitt øki í kjakinum um samanlegging: Økið er Sandoyggin. Politikararnir í oynni hava verið friðaligir um evnið. Tað verða teir tó ikki leingi afturat, tí landsstýriskvinna í kommunumálum, Helena Dam á Neystabø, hevur stungið út í kortið, at kommunurnar í landinum skulu vaksa, soleiðis, at tær gerast størri, men færri. Helst færri enn 10 kommunur, sigur landsstýriskvinnan. Vit hava spurt borgarstjórarnar í Sandoynni, hvat teirra hugsan er um málið.

### Ynskir størri valfrælsi

Borgarstjórin í Sands kommunu, Páll á Reynatúgvu, sigur, at lítið formelt kjak hevur verið um evnið. Undanfarna bygdarráð hevið spurningin uppi at venda, men hildið varð, at áskoðanirnar vóru ov ymiskar til at taka málið upp júst tá.

– Vit hildu tað ikki tæna nøkrum endamáli tá (tá undanfarna bygdarráð sat blm.) at trýsta málið fram. Vit mettu tað vera betur, um kommunurnar, sum ivaðust í samanlegging, komu til teirra egnu niðurstøðu fyrst, sigur Páll á Reynatúgvu.

Hann sigur víðari, at rákið millum fólkið heima á Sandi hevur verið jaligt um samanlegging, men at hann ikki kann svara fyri, hvør núverandi støðan er millum heimasandsfólkið.

Páll á Reynatúgvu sigur, at í næsta valskeiði sleppur mann ikki frá at taka spurningin upp og koma til eina endaliga avgerð í málinum.

– Tó hevði eg ynskt, at vit høvdu størri valfrælsi, sigur Páll at enda og vísir til løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007, um sjálvbodna kommunusamanlegging. Hon sigur greitt, at ein komandi Sandoyar kommuna kann innihalda bygdirnar á Sandoynni saman við Skúvoyar kommunu. Í stk. 2 stendur, at Vestmanna og Kvívík hava størri frælsi og kunnu velja millum trý økir at fara uppí. Økini eru Vágar, Sundalagið og Tórshavn. Páll á Reynatúgvu sigur, at hann vildi havt sama frælsi at velja sum Vestmanna og Kvívík.

### Samanlegging eingin frelsandi eingil

Somikið bersøgin er borgarstjórin í Skálavík, Linjohn Christiansen.

Linjohn saknar kjak um evnið, men heldur, at tilgongdin til málið hevur verið skeiv.

– Ístaðin fyri at diskutera fyrimunirnar, skuldi mann heldur diskuterað vansarnar fyrst og avgreitt teir, heldur hann.

Linjohn Christiansen sigur, at menning er ikki garanterað við samanlegging, tí kommunurnar samstarva um nógv sum er, t.d. lækna, prest og framhaldsdeild á skúlunum, so tað einasta, sum broytist við einari møguligari samanlegging er, at mann fær ein felags pengapott. Linjohn vísir á, at tað er ikki bara jaligt, av tí at kommunurnar í oynni ikki eru so væl fyri fíggjarliga, so samanlagda kommunan hevði ikki verið ein serliga rík kommuna.

- Tað, sum er umráðandi, er at vit kunnu leggja saman við Tórshavn, tí tá gerst lættari at fáa fólk hendaveg, sigur Linjohn Christiansen.

- Ein fyritreyt fyri tí er, at ein Sandoyartunnil verður veruleiki, sigur hann at enda.

### Ivast í samanlegging við Tórshavn

Hanus undir Leitinum borgarstjóri í Húsavíkar kommunu, sum umfatar bygdirnar Húsavík, Dal og Skarvanes, vil ikki vísa málinum frá sær, men sigur, at onnur mál skulu loysast, áðrenn ein samanlegging millum kommunurnar verður veruleiki.

- Jacob Vestergaard hevði eitt fínt uppskot um umfígging í lánunum hjá kommunum í Sandoynni og Suðuroynni og síðani at leggja kommunurnar saman, tá hann sat við kommunumálum í landsstýrinum. Uppskotið var hildið at verða gott, men einki bleiv gjørt víðari við tað, sigur Hanus undir Leitinum.

Borgarstjórin í Húsavíkar kommunu er annars samdur við Linjohn Christiansen um treytirnar fyri samanlegging. Fyrst skal tað fíggjarliga fáast upp á pláss, og síðani kann samanlegging takast á dagsskránna.

– Vit deilast longu um so nógv, at tann fíggjarligi parturin er tað, sum umræður at fáa uppá pláss, sigur Hanus undir Leitinum.

Hanus heldur annars, at fólkið í oynni kanska hevði gingið við til eina møguliga samanlegging og kanska enntá at lagt saman við Tórshavn, men Hanus er ivandi í hesum málinum.

– Um helvtin av Føroyum kann stýrast úr Havn, er tað líka frægt at leggja allar Føroyar í eina kommunu, sigur Hanus undir Leitinum, borgarstjóri í Húsavíkar kommunu at enda.

### Útjavning áðrenn samanlegging

Gerhard Lognberg, borgarstjóri í Skopun, vil hava eina kommunala útjavning setta í verk, áðrenn ein samanlegging verður veruleiki. Áðrenn tað vil hann ikki hava eina samanlegging.

– Mann kundi spart nógv av eini samanlegging, sigur Gerhard Lognberg. Hann sigur víðari, at alt avhongur tó av barnafamiljum, sum kunnu geva samfelagnum m.a. børn og pening.

– Vit hava gjørt nógv fyri at tiltrekkja barnafamiljur við t.d barnagarði og útstykkingum, sigur Gerhard Lognberg.

- Tá Sandoyartunnilin kemur, verður tað nátúrligt, at vit leggja saman við Tórshavn, sigur Gerhard Lognberg. Gerhard sigur, at møguleikarnir verða stórir, tá Sandoyggin og Tórshavn kunnu leggja saman.

– Sandoyggin kann fimmfaldast í fólkatali, og nógv virkir kunnu flyta suður, sigur Gerhard Lognberg. Hann leggur tó dent á, at alt hetta enn bert eru tankar, og at einki er diskuterað enn í bygdaráðnum.

– Tað verður upp til eitt komandi bygdaráð at taka eina avgerð í hesum spurninginum, sigur borgarstjórin í Skopunar kommunu at enda.